# EG FØLDI MEG Á LÍVI

## GUÐRUN SÓLJA JACOBSEN

*Vinnari av »Stjerne for en aften« í 2003*

**Hvussu minnist tú aftur á tíðina í Stjerne for en aften?**
– Eg minnist aftur á tíðina sum nakað heilt serligt. Tað var spennandi, mennandi og stuttligt. Tað var heilt fantastiskt, og eg føldi meg veruliga á lívi.

**Hevur tú fingið nógv burturúr eftir kappingina?**
– Ja, eg havi uttan iva fingið nógv burturúr. Tað hevur givið mær størri sjálvsálit, og møguleikan at liva av tí. Eg dugi ikki at siga, hvar eg hevði verið uttan Stjerne for en aften. Tað hevur latið nakrar dyr upp, sum eg ikki hevði viljað livað uttan. Røddin er eisini blivin sterkari síðani, og eg havi brúkt nógva tíð og nógvir pengar upp á at útvikla hana. Tí nú veit eg, at eg vil liva av tónleikinum.



**Heldur tú, at tú átti at fingið meira burturúr?**
– Eg kundi kanska fingið meira burturúr, um eg hevði verið eitt sindur betri fyrireikað til tíðina eftir kappingina. Tí tað er tá, at ein skal standa sína størstu roynd.

**Hevði tú viðmælt øðrum at melda seg til kappingina, um hon framvegis var til?**
– Hetta var ein tann mest seriøsa kappingina, meðan hinar mest snúgva seg um undirhald og ikki røddina ella tað, at verða sangari. Men ein skal gera sær greitt, júst hvat tað er, ið ein meldar seg til. Tað er hart trýst og nógv krøv bæði áðrenn, meðan og eftir kappingina. Tað má man verða klárur til.

**Hvussu nógvar stjørnur vilt tú geva Stjerne for en Aften?**
5! Stjerne for en aften fær fult hús frá mær.

# HÓSKAÐI ONGANTÍÐ INN Í MYNDINA

## GUNNAR HOLM MIKKELSEN

*Vinnari av »Stjerne for en aften« í 2003*



**Hvussu minnist tú kappingina Stjerne for en aften?**
– Eg minnist fyrst og fremst Stjerne for en aften sum eina fantastiska tíð. Eg var áleið 20 ára gamal og hevði hug at royna øll møgulig nýggj ting, og brádliga lótu fleiri hurðar seg upp fyri mær. Men samstundis var tað ótrúliga frustrerandi. Tað var frustrerandi, tí tann tónleikurin, sum eg spæli, hóskar seg ikki til sjónvarp, men er slíkur tónleikur, sum fólk sjálvi skulu uppdaga á lítlum kafe'um. Mín tónleikur er øðrvísi enn tónleikurin hjá øðrum, og tí hóskaði eg ongantíð saman við mínum umboðsmanni og heldur ikki saman við teimum støðunum, sum eg skuldi spæla til.

**Hevur tú fingið nógv burturúr tíni karrieru eftir kappingina?**
– Tað dugi eg illa at meta um. Hugsa vit um søluna av fløguni, so havi eg ikki fingið nakað burturúr. Men tey fólkini, sum eg havi hitt, hava givið mær nógv, og eg havi lært ótrúliga nógv, sum ikki kann gerast upp í pengum. So á tann hátt vil eg siga, at eg havi fingið nógv burturúr kappingini. Men eg eri hvørki blivin ríkur ella ein MTV stjørna.

**Kundi tú fingið meira burturúr?**
– Eg hevði ongantíð væntað at vinna Stjerne for en aften. Tað kom veruliga óvæntað, tí væntaði eg einki av kappingini. Eg tók í veruleikanum bara ímóti tí, sum eg kundi fáa. Men eg fari at nýta tey sambond, eg nú havi, í framtíðini.

**Vilt tú viðmæla øðrum at melda seg til kappingina ella líknandi kappinga?**
– Tað veldst um, hvør man er, og hvat man vil. Ein skal gera sær greitt beinanvegin, júst hvør sending talan er um. Og tú skalt ikki verða skuffaður, tá ið tey biðja teg undirskriva ein sáttmála, har tú skalt út í keypssentur at syngja. Tú skalt taka avgerð um, hvørt tú kanst nýta royndirnar til nakað, og heldur tú, at tú kanst tað, so mást tú taka tað keðiliga við eisini. Vilt tú verða Pink ella Katy Perry, so kanska slíkar kappingar eru fínar. Men vilt tú verða tann næsti David Bowie, so er tað nokk ikki tað rætta fyri teg.

**Hvussu nógvar stjørnur vilt tú geva Stjerne for en aften?**
Stjerne for en aften fær 2.5 stjørnur frá mær.

# EG HAVI HEILT ERLIGT IKKI DUGAÐ NÓG VÆL

## LINDA ANDREWS

*Vinnarin av »X-Factor« 2009*



**Hvat hevur tú fingið burturúr X-Factor?**
– Tað týdningarmesta er sjálvandi, at nú vita tvær milliónir fólk, hvør eg eri. Eg havi eisini fingið nógvar royndir. Bæði góðar og ringar. Og so havi eg sjálvandi fingið nógvar vinir og kenningar. Men eg havi lært ótrúliga nógv um meg sjálva. Eg havi lært, at eg ongantíð aftur fari at geva eina fløgu út, uttan at tey, sum arbeiða við mær, brenna fyri sakini.

**Hevur tú dugað nógv væl at útnytta X-Factor heitið?**
– Heilt erligt, so havi eg nokk ikki dugað tað nóg væl. Tá fløgan kom út, heglaði kritikkurin niður yvir meg, og eg gjørdist næstan flóv av at eg hevði vunnið. Eg fekk kensluna av, at tað var ókul at vinna. Eg brúkti nógva tíð uppá at summa meg eftir tað. Eg meldaði meg jú til, tí tað var ein stór succes í Bretlandi og Amerika, har vinnararnir gjørdist stórar heimsstjørnur eftir sendingina. Men soleiðis er tað ikki í Danmark.

**Skal X-Factor halda fram?**
– Tað er ein fín sending. Men tað snýr seg um alt annað enn tónleik. Eg meldaði meg til fyri at fáa ein møguleika í tónleikaheimimnum. At verða tikin sum ein seriøsur tónleikari. Men tónleikurin er ikki tað, sum fólk fokusera uppá. Tey hugsa meira um privatlívið hjá einum heldur enn røddina. Man skal verða vitandi um, at man stillar seg upp sum undirhald. Allir X-Factor luttakararnir eru bert ein brikkur í spælinum hjá DR. Tað snýr seg heldur ikki um at finna góðar røddir. Er røddin góð, er tað eitt plus, men tað týdningarmesta er, at luttakararnir eru øðrvísi – serligir á onkran hátt.

*(Samrøða við Lindu Andrews í Sosialinum 1. apríl 2011)*

# MÆR DÁMAR VÆL AT BERJAST FYRI AT KOMA VÍÐARI

## ANNA NYGAARD

*Gjørdist nummar 5 í »X-Factor« 2010*

**Hvussu minnist tú aftur á tíðina í X-Factor?**
– Eg minnist aftur á tað sum eina fantastiska uppliving, sum eg helst ikki fari at uppliva aftur. Hvør vika var ótrúliga spennandi og lærurík, og eg eri eisini glað um at hava fingið so nógvar góðar vinir burturúr



**Hevur tú fingið nógv burturúr tínari karrieru eftir kappingina?**
– Ja, eg útgav eina fløgu næstan beint aftaná X-Factor, og hon hevur givið mær møguleikan at framføra fyri fólkum í øllum Danmark. Eg havi hitt fleiri av teimum dugnaligastu fólkunum innan tónleikavinnuna, sum eru fantastisk at arbeiða saman við.

**Átti tú at fingið meira burturúr?**
– Eg veit ikki, um eg átti at fingið meira burturúr. Eg gjørdist nr 5 í kappingini og hevði helst ikki væntað tað heilt stóra av mær sjálvari. Hinvegin dámar mær væl at føla, at eg skal berjast fyri at koma víðari, og at eg ikki bara fái alt.

**Vilt tú viðmæla øðrum at melda seg til X-Factor?**
– Eg vil í hvussu er ongantíð frámæla nøkrum at fara. Tað krevur øgiliga nógv av einum sálarliga at vera við í slíkari kapping, og tí skal ein hugsa seg væl um áðrenn. So skal ein nokk heldur ikki vænta, at alt verður ein dansur á rósum aftaná, tí fólk fara ikki bara at bjóða tær alt bara tí, at tú hevur verið við í einari talentkapping - tú mást berjast fyri

**Hvussu nógvar stjørnur vilt tú geva X-Factor?**
5.5 av 6 stjørnum, tí at X Factor er ein fantastisk undirhaldsending, sum hevur givið mær nógvar royndir.

